# Hvar liggur tann nýggja brennistøðin best?

EIRIKUR Á HÚSAMØRK



Nú Elin Lindenskov hevur dyrgt fram undir, at ein nyggj felags brennistøð skal setast upp í Havn, fari eg at loyva mær at gera nakrar viðmerkingar.

Ringt er at broyta hugsunarháttin hjá lokalpolitikarum, og tískil er hetta lesarabrævið einamest skrivað til tann gløgga lesaran.

Hvat talar fyri, at ein nýggj felags brennistøð má verða í Havn. Eg havi íhvørtfall ilt við at síggja fyrimunirnar; nú vit á Hagaleiti eftir fáum árum í framleiðslu, eru størstu brúkarar av fjarhita í Føroyum.

Faktum er, at Faroe Marine Products (hereftir stytt til FMP) er størsti brúkari av fjarhita í Føroyum; meðan hitafelagið í Havn, er tann minni forbrúkarin av fjarhita, hóast tað bleiv byrjað upp á Hitafelagið í teimum villu 80"unum.

Tískil eru IRF og FMP tey, ið representera nógv tann besta grøna roknskapin. Viðmerkjast skal, at tá tað bleiv ført fram, at útlátið er vaksi hjá skipunum, meðan tað hinvegin er minkað hjá fiskivinnuni á landi. Hetta kemst av tí einfaldu grund, at flestu flakavirkir eru givin at frysta slógvið inn.

Innfrysting er sera orkukrevjandi afturímóti at turka fiskaúrdráttirnar við grønari fjarhitaorku frá IRF.

FMP hevur keypt slógvið frá fiskivinnuni og turkað tað við hita frá IRF og harvið klárað at gagnytt tað, ein fyrr kallaði fyri burturkast/slógv dupult. Tvs at nú fær IRF og flakavinnan meira pening fyri tað sum fyrr var at rokna sum burturkast. Tað sama kann neyvan sigast, um KOB og Fjarhitafelagið.

Tann størsti munurin fyri tann føroyska Skattgjaldaran, tá ein vil vita munin á fjarhitafelagnum í Havn og FMP er.

Meðan Fjarhitafelagið er blivið sanerað við 60 milliónum krónum upp á skattaborgarans rokning, hevur FMP gjørt íløgur fyri yvir 60 milliónir krónir uttan at hetta hevur kostað palleba eina krónu.

Hetta er gjørt við góðum uppbakningi frá føroyskum peningastovnum. Samstarvið hevur verið somikið fruktagott, at vit hava keypt íslenska partin og harvið er FMP 100% føroyskt.

Í stuttum vil tað siga, at øll virðisøkingin sum verður skapað, liggur eftir í Føroyum.

Henda íløga hevur skapt 60 heilársverk har fólk, eisini úr Havn, hava eina fastu inntøku av.

Lat tað standa rimmar fast, at hetta hevur FMP einans megnað við tøttum samstarvi víð fiskivinnuna og IRF; Tí at framleiða avlopið frá fiskivinnuni við fjarhitaorkuni hjá IRF til mannaføði til eitt triðja land, kemur ikki upp av sær sjálvum.

Í stuttum. Her er lagt eitt meirvirði til føroyska samfelagið upp á 40 milliónir krónur um árið tey síðstu árini.

Nú tað er frammi um branding av Føroyum, so vil eg upplýsa lesaran, at FMP Faroe Island er roknað sum tað besta vørumerkið á Nigerian Stockfish Market (tvs siga fiskamarknaðinum) og harvið er alt Føroyar vælkent, upp á ein positivan hátt, á tí figerianska Fiskamarknaðinum. Hetta er ein marknaður uppá 140 til 150 mill fólk, og tað eiga allir føroyingar at verða ernir av.

Eisini vil eg uplysa, at FMP er tann mest framkomna og størsta fabrikkin av sínum slagi í øllum heiminum innan sítt øki. Hetta var eisini ein av grundgevingunum fyri, at FMP bleiv kosið ársins virki 2005.

Aftur til spurningin um hvar skal brennistøðin liggja?

Sjálvandi skal ein Brennistøð liggja har hon er best fyri samfelagið, bæði viðv. gagnnytslu av orku og við búskaparligum atliti.

Tá eg hugsi at fjarhitarør ikki hava eina æviga livitíð, og tá eg spyrji serfrøðingar á økinum, siga teir, at livitíðin er umleið 15 til 30 ár alt eftir góðsku og viðferð, so er tað eyðsýnt, at Fjarhitafelagið stendur framman fyri stórum íløgum í nærmastu framtíð. Mín vón vil verða, at partar av rokningini ikki aftur verða lagdar á skattgjaldaran uttan fyri Havnar Kommunu.

Í Leirvík hava vit staðiliga víst, at tað er skjótari at byggja eitt virki sum FMP til at gagnnyta mesta og besta fjarhitan í mun til Fjarhitafelag, sum er gjørt í Havn.

At tað er bíligari og betri fyri skattgjaldaran, óansæð politiskan lit, tað hevur tann gløggi lesarin langt síðani fingið við.

Nú er bert at vóna at tey íð vit hava valt at umboða og stýra fyri okkum, eisini fáa tað við, soleiðis at ikki óneyðugar byrðar, verða lagdar á okkara herðar.

Eg vil sum stjóri á tí virkið, ið brúkar mesta fjarhitan í Føroyum, takka fyri upptøku og ikki allarminst tí gløgga lesaranum.

# Deyðans vatn

SVENNING AV LOFTI



Sambært tíðindunum er brennivínshúsið, Dism, komið við einum nýggjum rúsløgi, sum framleiðararnir geva heitið Lívsins Vatn.

Mong hvøkku við og mettu tað, sum spottan av ringum slagi tá ið hesi tíðindi spurdust í útvarpinum, vitandi at rúsdrekka er ein tann største figgindin av lívs- og familjuvirðum, ja sjálvum lívinum.

Stórt tal av føroyingum doyggja árliga beinleiðis og óbeinleiðis av brennivínsávum. At kalla nýggju brennivínsútgávuna fyri "lívsins vatn" er ein háðan móti øllum teim landsmonnum, sum dagliga er bundnir av brennivíni og teirra kæru, sum royna at hjálpa teimum úr teirra lívsmarru.

Eg kenni mong menniskju sum vórðu jarðløgd av brennivíni og sum bannaðu tí degi tá ið tey drukku fyrsta snapsin, sum førdi tey inn á eina vandakós við hjúnaskilnaði og beinleiðis húsagangi í kjalarvørrinum. Men hesi hoyrdu um Jesus, um Hann, sum kundi geva teimum hitt SANNA lívsins vatnið, sum EINA kann sløkkja sálartosta menniskjans. Tá ið tey drukku av hesum SANNA lívsins vatni broyttist lív teirra. Eins hím reistust tey aftur á føtur, røddin gjørdist reystari, roðin kom aftur í bleika andlitið, hitt sorlaða húskið kom saman aftur, gleðin, friður eydnan, tryggleikin og hugnin og láturin fingu aftur sítt mista pláss. Sanniliga, júst hetta er munurin á tí FALSKA lívsins vatni og tí SANNA lívins vatni, sum er Jesus. Æviga sonn eru orð Meistarans úr Nazaret:

"Hvør tann, ið drekkur av hesum vatni, skal tysta aftur. Men tann, ið drekkur av vatninum, ið eg gevi honum, skal ikki tysta í allar ævir; nei vatnið, ið Eg gevi honum, skaal verða í honum ein kelda av vatnið, sum springur upp til ævigt lív."

# Velbastaður lýstur hús fyri hús

***Fólk og hús á Velbastað* er heitið á nýggjari bók, har velbastaðmaðurin Leon Andreassen lýsir bygdina hús fyri hús**

SIÐSØGA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hetta er bók um ta gomlu bygdina á Velbastað og tað fólk, har hevur búð. Rithøvundurin er velbastaðmaðurin Leon Andreassen. Bókin lýsir bygdina hús fyri hús, býling fyri býling. Hon greiðir frá ognarviðurskiftum og gørðunum, hon sigur frá tilflytarum gjøgnum tíðirnar, og hevur yvirlit yvir fólkið í bygdini.

Velbastað er einasta føroyska bygdarnavn, ið endar við staður, ið annars er vanligt í øllum hinum norðanlondunum. Greitt verður frá, hvat lærdir hava hildið um hetta navn, og hvar bygdin hevur verið frá elstu tíð. Greitt verður frá útgrevstri í Fossdali og nakrar sagnir av Velbastað eru við.

129 eldri og nýggjari myndir av fólki og støðum eru í bókini.

### Handrit tikið fram aftur

Tá Velbastaðar og Kirkjubøar kommuna varð løgd saman við Havnar kommunu í 2005 gjørdist skilligt, at hetta fór at hava stórar broytingar við sær í tí gomlu bygdini. Gongdin hesi fáu árini síðan hevur váttað, at um stutta tíð fer hin gamla bygdin helst í søguna. Hana vildi Leon Andreassen skriva um, men tá hann doyði bert 56 ára gamal í 2001, var hann ikki heilt liðugur við handrit sítt. Hildið varð, at skal nakað koma fram skrivligt um hesa búnaðarbygd við óbroyttum búsetingarmynstri í øldir, skal tað vera nú, meðan tey fólk, ið higartil hava roknað seg sum velbastaðfólk enn kunna siga frá, og fólkið í teimum nýggju býlingunum fær kunnað seg við staðið, tey nú eru partur av . Tí varð handritið hjá Leon Andreassen tikið fram aftur og útgivið. Tað er Eyðun Andreassen, systkinnabarn høvundans, sum hevur lagt útgávuna til rættis, tó við hollari hjálp frá áhugaðum bygdarfólki.

*Fólk og hús á Velbastað* er 172 blaðsíður og kostar 280,00 í bókabúðunum. Øll eru vælkomin til bókarframløgu.

Sunnudagin 22. november klokkan 15.00 verður almenn framløga í Sólarmagn á Velbastað av bókini *Fólk og hús á Velbastað* eftir Leon Andreassen. Vestankórið syngur og Nikolas Kapnas spælir. Ein kaffimuður fæst eisini. Øll eru vælkomin til bókaframløguna, har høvi verður at ogna sær bókina fyri serprís.

Mánadagin 23. november verður bókin at fáa í bókabúðunum.




*Leon Andreassen vildi skriva um Velbastað, áðrenn gamla bygdin heilt er farin í søguna*